# Skráseting og skipan av nýttum bókmentum og keldum

Niðanfyri eru dømi um, hvussu nýttar bókmentir og keldur verða skrásettar. Endamálið er at fylgja mynstrinum fyri altjóða viðurkendum skrásetingarháttum. Mælt verður til at nýta niðan fyri standandi skipan/mynstur, tá ið uppgávur og ritgerðir verða skrivaðar í 9. og 10. flokki. Tá ið víst verður til kelduna inni í tekstinum sjálvum, skal keldan setast inn í klombur við høvundanavni og árstali, sum t.d. (Oddfríður Marni Rasmussen, 2011), (Regin Marnersson, 2012) o.s.fr. Umráðandi er, at einans nýttar (endurgivnar) bókmentir og keldur verða skrásettar.

## Keldur / Bókmentir

| | |
|---|---|
| **Bók:** | Rasmussen, Oddfríður Marni (2011): *Blómugrót*. Sprotin 2011. |
| **Brot úr bók:** | Rasmussen, Oddfríður Marni (2006): Pilturin og steinurin. Í *Les 1*, Føroya Skúlabókagrunnur 2006. |
| **Tíðarrit:** | Marnersson, Regin (2012): Um iPad er svarið, hvør er so spurningurin? *Skúlablaðið,* 3/2012. |
| **Dagbløð:** | Fossaberg, Rannvá G. (2012): Føroysk klæðir kosin sum vakrast. *Sosialurin,* 25. juni 2012. |
| **Tónleikur:** | Teitur (2010): Feel good. Á fløguni *Let the dog drive home.* Arlo & Betty Recordings 2010. |
| **Listaverk:** | Mortensen, Anker (1999): Dukka mín er blá. Oljumálningur 100 x 130 cm. Í *Les 1*, 1999. |
| **Samrøða:** | Rasmussen, Oddfríður Marni (2012): *Synopsan er framtíðin*. Persónlig samrøða við Rannvá Skeel Johannesen, ikki útgivin. |
| **Elektroniskir miðlar:** | Rasmussen, Oddfríður Marni (2012, 20.04): At fortelja søgur. Heintað á http://www.skulabladid.fo/Bloggur.aspx?ID=854&M=News&PID=2485&NewsID=6139, 05.07.2012. |

Henda skipan byggir á viðurkenda tilvísingarháttin APA.
Sí http://owl.english.purdue.edu/owl/resource/560/01/